Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 30.09.2025
Mál nr.: 24/22544
Málsviðgjørt: JEK,DH,BAB

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Galdandi orðingar	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 7. mars 2024, verða gjørdar hesar broytingar:
Stk. 2. Fyri motorakfør, skrásett sum leiguakfør, skal akfarið antin hava havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hava koyrt í minsta lagi 8.500 km og hava verið skrásett sum leiguakfar í minsta lagi 6 mánaðir, ella hava verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár. Við sølu av leiguakfari kann frádrátturin í mesta lagi vera 60.000 kr. í útgangandi avgjaldinum fyri hvørt leiguakfar. Fyri motorakfør, nýtt til skúlakoyring, kann reglan í stk. 1 verða nýtt um so er, at akfarið hevur verið nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir.	**1.** § 10, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Fyri motorakfør, sum eru skrásett sum leiguakfør, har meirvirðisgjald ikki er faktureraða til endabrúkaran, skulu virki við sølu av motorakførunum avgjaldsavgreiða hesi eftir søluprísinum frádrigið ein prosentpart av skrásetingargjaldinum. Prosentparturin er 90% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett minni enn 1 ár. Prosentparturin lækkar síðani við 10 prosentstigum árliga inntil hann er 0% prosentstig 10. árið. Fyri motorakfør, nýtt til skúlakoyring, kann reglan í stk. 1 verða nýtt, um so er, at akfarið hevur

	verið nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir.”
	2. Í § 12, stk. 1verður sum litra u sett: “u) Sølu av grønmeti, ið koma undir vørunumrini 0701.10.00 til og við 0714.90.90 og av blæum til børn, ið koma undir vørunumrini 9619.00.50 og 9619.00.81.”